# Vælkomin á Vestanstevnu

**Eivin H. Jacobsen**
*Borgarstjóri*



Sum lesarin veit, verður Vestanstevnan hildin í ávikavist Vestmanna, Sandavági, Miðvági og Sørvági.

Í ár er tað okkara túrur. Og tað, at stevnan er her, er nakað serligt fyri okkum, sum hava slitið barnaskógvarnar her. Vit minnast hesar stevnur, sum verið hava her, sum nakað serligt. Tær fáu stevnur, sum eru í okkara barna- og ungdómslívi, hava fest seg í minnið fyri lívið, sjálvt um skráirnar ikki hava verið so fjølbroyttar, sum tær nú mangan eru.

Vit minnast fløggini, kappróðurin og vin- og skyldfólk, sum komu á vitjan. Og vit minnast fólk í góðum veitslulag.

Í ár er tað aftur okkara tørn at vera vertur fyri stevnuni. Børnini hava summarfrí, og tað hava foreldrini at flestu børnunum eisini. Hetta høvið at hava frí frá dagligum stríði og strevi skuldi verið góður karmur um hetta vikuskiftið á hásumri, sum samstundis er seinasta FM-stevnan í kappróðri fyri ólavsøkuna.

Bygdarráðið hevur eftir førimuni roynt at hampað og hugnað um bygdina, og tað hevur fólkið eisini gjørt.

Vestanstevnunevndin hevur roynt at lagt eina so fjølbroytta skrá, at øll skuldu kunnað farið til okkurt tiltak, sum hevur teirra áhuga.

Við hesum fáu orðum fari eg so bygdarráðsins vegna at bjóða øllum hjartaliga vælkomin á Vestanstevnu í Sørvági ár

# Sørvágur tekur í móti stevnugestum



*Sørvágur ger seg út at taka í móti gestum á Vestanstevnu*
*Mynd: Edvard Joensen*

## Rudding og asfaltering standa frammalaga hjá Sørvágs Kommunu, nú Vestanstevna verður í bygdini um vikuskiftið

STEVNUPRÁT
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Tað verður ruddað og asfalterað í Sørvági um dagarnar. Fólk mála hús og onkur snøggar sær eisini bátin, meðan gongd er í málingapenslinum kortini. Sørvágur ger seg til at taka í móti fremmandafólki á Vestanstevnu.

Eisini inni á Kommunuskrivstovuni eru teir í ferð við at snøgga. Myndirnar, sum hava hingið á vegginum, eru burtur. Spartlað er í okkurt hol og klárt er at mála.

Eivin Jacobsen, borgarstjóri, biður blaðmannin umbera óruddið. Men tað treingir eisini til eina hond her soleiðis av og á. Og tað skilja vit væl.

Almennur ruddingardagur hevur verið í Sørvági, og skúlabørnini ganga eisini við spaka og kusti um bygdina og taka upp slíkt, sum stevnugestirnir ikki skulu síggja.

–Jú, sørvingar eru rættiliga farnir at fríðka um, greiðir Eivin frá. Umleið eina millión krónur ætlar Sørvágs Kommuna at brúka upp á asfaltering av kommunalum vegum í bygdini. Og tað skal verða liðugt til Vestanstevnu, sigur hann, hóast hann samstundis heldur, at tað var kanska nakað seint, byrjað varð.

Tey vænta væl av fólki á vitjan og fáa eisini útlendska vitjan á Vestanstevnu, sigur hann.

Sørvágur og Akranes í Íslandi eru vinarbýir, og Sørvágs Kommuna fær almenna vitjan av Akranesi á Vestanstevnu. Millum annað kemur eitt rættiliga gott, íslendskt kór á vitjan, sigur Eivin Jaocbsen. Kórið fer at hava konsertir í Sørvágs kirkju á Vestanstevnu.

### Meira samstarv

Eivin Jacobsen, borgarstjóri, hevur sjálvur verið við til at fyrireika onkra Vestanstevnu, sum verið hevur.

Hann heldur, at samstarvið millum teir ymsu stevnufyrireikararnar kundi verið meira, enn tað er. Tá meinar hann við tær ymsu bygdirnar, sum skiftast um stevnuna.

Eitt nú eru maskinur og tílíkt, sum brúkt veðrur til undirhalds, sum stevnufyrireikararnir í oynni væl kundu gjørt felags íløgur í heldur enn at leiga tey aðrastaðni frá hvør sær, hvørja ferð stevna verður hildin.

Han ivast ikki í, at slíkar íløgur høvdu loyst seg. Og so høvdu tær eisini spart arbeiða í seinna enda, tá hvør sær hvørja ferð skal út at finna tað, sum brúkast skal. Tí tað plagar vanliga at verða tað sama ferð eftir ferð kortini, vísir hann á.

Eitt annað, Eivin Jacobsen heldur átti at verðið broytt, er býtið av stevnuni.

Sum er eru tað tær størru bygdirnar í Vágum og Vestmanna, sum skiftast fjórða hvørt ár um Vestanstevnuna.

Men tað átti at verið so, heldur hann, at stevnan var ein Vágastevna burturav. Hann heldur, at tað tað er ov leingi at bíða fýra ár eftir stevnuni. Og varð hon hildin í Vágum burturav, fingu feløgini í oynni eisini betri úrtøku burtur úr henni.

–Tað er jú eingin ivi um, at tað eru pengarnir til raksturin hjá lokalu feløgunum, hugsað verður um á eini slíkari stevnu, viðgongur hann.

Hjá kommununi eru tað so at siga bara útreiðslur av at hava slíka stevnu, um hugsað verður bara peningaliga. Men sjálvandi verða ting gjørd til slíkt høvi, sum annara kanska høvdu ligið á láni, tekur Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági aftur í aftur.

### Sørvágur væl fyri

Hóast onkuntíð hevur verið tungt, er Sørvágur rímiliga væl fyri í dag, sigur Eivin Jacobsen, borgarstjóri.

Hann greiðir frá, at tá ringast stóð til undir kreppuni, sum var, var kommunuskuldin rættiliga stór. Í dag er hon komin niður á eina hálva álíkning. Og alt hevur kommunan klárað at goldið sjálv. Har hevur eingin sanering verið, sigur hann errin og fettir sær líkasum eitt sindur á.

Men hann viðgongur tó, at okkurt, sum kanksa átti at verið gjørt, hevur ligið heldur leingi. Eitt nú asfalteringin av kommunalu vegunum, sum nú verður gjørd til Vestanstevnuna.

Borgarstjórin heldur ikki, at tað er rætt, tá onkuntíð verður sagt, at Sørvágur er ein sovibygd.

–Tá flakavirkið koyrdi upp á tað besta, arbeiddi væl av fólki har. Tað er rætt. Og tey sóust eisini væl aftur, tá tey fluttu seg til og frá arbeiði, heim til døgurða og aftur til arbeiðis. Tá eini 60-70 fólk ferðast Út á Bakka fleiri feðir um dagin, merkist tað.

Nú eru tey ikki har, men aðrastaðni til arbeiðis. Eini 20-30 arbeiða tó á alivirkinum, og tey síggjast eisini.

Men so eru tað øll hini, sum eru á eitt nú flogvøllinum, og ikki hava sama ferðingarmynstur, sum tey á havnarlagnum.

Men hann harmast tó um, at Vesturvarði er seldur av bygdini. Tað er greitt, at tað eisini fer at merkjast, at hann ikki fer at landa til móttøkuna í Sørvági.

–Tað átti í grundini at verið ein treyt, at eitt ávíst tal av fiskiloyvum skuldi ligið í útjaðaranum, heldur borgarstjóri í Sørvági. Og hann heldur ikki, at tað er nøkur góð grundgeving fyri, at so ikki er.

–Hatta við fríu marknaðarkrefturnu kunni vit gott gloyma, sigur hann. Tí vit hava kravt, at alt, sum brúkast skal í oljuvinnuni, skal um føroyskan bryggjukant. Og so hava vit slept tí ideologiini. So har er einki, sum forðar fyri, at vit kunnu leggja eina slíka binding á fiskiloyvini eisini, sigur Eivin Jacobsen, borgarstjóri í Sørvági.



*Høvuðstiltakið á Vestanstevnu verður kappróður á Sørvágsfirði*
*Mynd: Edvard Joensen*



*Í hesum umhvørvinum fara nógv av stevnutiltøkunum at verða hildin*
*Mynd: Edvard Joensen*

CELTIC PACIFIC SHIP MANAGEMENT (OVERSEAS) Ltd

Require for service with [illegible] Ltd, an AHTS vessel and SBV's Officers with STCW 95 approved Certificates of Competency as:

MASTER, MATE, CHIEF or SECOND ENGINEER

Salaries are paid in £'s and are based on 4 or 3 week tours of duty with equal leave periods.

Applications including experience and copies of certificates should be sent to: [illegible] Ltd 149 Albert Quay, Aberdeen, AB11 5QA
Fax on 44(0)1224 210692 or e-mail to: [illegible]





# Selvík á Vestanstevnu



*Dekksbáturin Selvík varð smíðaður til Sørvágs í 1914 og er nú aftur komin til heimbygdina*
*Mynd: Edvard Joensen*

## Áhugafelagið Selvík í Sørvági fer á Vestanstevnu at sýna fram dekksbátin Selvík, sum gjørdur er í stand og settur upp á land í Sørvági

FRAMSÝNING
*Edvard Joensen*

**Sørvági:** Tað stendur ein ístandgjørdur dekksbátur á landi niðri við fótbóltsvøllin í Sørvági. Hann verður standandi á landi, og høvið verður hjá vitjandi at síggja bátin á Vestanstevnu.

Tað er áhugafelagið Selvík í Sørvági, sum fyri umleið hálvumøðrum ári síðan keypti bátin við tí endamáli at seta hann í stand, soleiðis at fólk kunnu siggja hann og gleðast um hann, sigur Esbern Joensen, sum er ein teirra, sum stendur aftan fyri felagið.

Talan er um 19 sørvingar, sum hava tikið seg saman til hetta tiltakið, sigur hann. Nakað av nostalgi er uppií, viðgongur hann.

Endamálið við hesum tiltakinum er at fáa ein bát, sum kann minna á gomlu útróðrarbátarnar í Sørvági og samstundis vera eitt prýðið fyri bygdina.

Teir hava eina tíð leitað eftir einum slíkum báti, men tað gekk einki soleiðis. Prísirnir vóru ikki slíkir, at teir hildu tað vera skilagott.

Men so varð hesin báturin knappliga tøkur, og teir keyptu hann. Tað gjørdi tað so ikki verri, at báturin í síni tíð varð smíðaður júst til Sørvágs. Tá æt hann Selvík, so sjálvsagt var, at hann fekk upprunaliga navnið aftur.

Tað vóru Sigmundardreingirnir í Sørvági, sum lótu bátin smíða í 1914. Lauritz Debes, Lauritz í Mortansstovu, í Havn, smíðaði bátin, sum kom til Sørvágs tann 6. november 1914, eftir sum upplýst er, greiðir Esbern Joensen frá.

Ætlanin er, at báturin skal verða standandi á landi. Tað verður bæði lættari og bíligari at halda hann tá, metir Esbern Joensen.

Á Vestanstevnu fer hann at standa við fótbóltsvøllin. Men enn er ikki endaliga avgjørt, hvar hann verður settur permanent. Tað fer Sørvágs Kommuna at avgera. Men møguleiki er fyri, at hann bara verður verðandi har, hann nú er.

Málið hjá teimum, sum eiga bátin var, at hann skuldi verða liðugur til Vestanstevnuna í ár.

Esbern Joensen sigur, at tað eydnaðist so gott sum. Tó so, at niðri undir er hann ikki heilt liðugur enn. Men kortini soleiðis, at motorur er settur í. Teir hava fingið ein gamlan Tuxham motor, sum teir hava havt í gongd. Og gongur eftir ætlan, verður hann eisini settur í gongd á Vestanstevnu, sigur Esbern.

Tað kostar sjálvandi at keypa ein slíkan bát, seta hann i stand og røkja hann. Hóast felagslimirnir hava lagt stórt arbeiði í hetta tiltakið, hevði tað als ikki borið til uttan tann stóra stuðul, teir hava fingið frá sørvingum bæði burturi og heima, umframt øllum hinum, sum hava stuðlað tiltakinum. Alt tiltakið sum tað er, er fíggjað við stuðuli, sigur Esbern Joensen, sum er ein teirra, sum stendur aftan fyri Áhugafelagið Selvík, sum eigur dekksbátin Selvík.

